# Annika Vang enn eitt føroyskt met

**Umframt nýggja føroyska metið hjá Anniku, settu fleiri av hinum skjúttunum persónlig met í kapping leygardagin**

BOGASKJÓTING
*Hilmar Jan Hansen*

Av teimum mongu ítróttargreinunum, sum verða íðkaðar í Føroyum, man bogaskjótingin vera tann, ið hevur havt størst framgongd, hóast hon ikki er so gomul í Føroyum.

Hetta varð eisini undirstrikað leygardagin, tá bogaskjótifelagið Tambar skipaði fyri kapping millum teir ungu bogskjúttarnar, ið royndu seg úr fimtan metrum móti 60 sentimetra stórum máli.

Mong kláraðu seg væl, men serliga skaraði avrikið hjá 13 ára gomlu Anniku Vang úr bogaskjótifelagnum Ørvi burturúr, tá hon setti nýtt føroyskt met, ið var 18 stig betri enn tað, hon sjálv setti í fjør.

Annika vann eisini kappingina hjá recurveskjúttunum við 553 stigum. Nummar tvey gjørdist Eirik í Jákupsstovu úr Ørvi við 504 stigum og nummar trý Áki Herálvsson úr Tambum við 495 stigum.

Ikki færri enn tólv skjúttar kappaðust í recurvebólkinum, harav fleiri settu persónlig met.

**Javnt í compound**

Skjúttarnir í compoundbólkinum vóru hesa ferð bara tríggir í tali, men kortini gjørdist kappingin her minst líka spennandi og jøvn.

Alberta Gaardlykke vann compoundbólkin við 533 stigum, men stutt var niður til nummar tvey og trý, ið gjørdust ávikavist Ásmundur Gaardlykke við 529 stigum og Álvi Joensen við 527 stigum.

Allan vegin var kappingin millum hesi trý sera jøvn, og bara smávegis frávik kundu saktans havt gjørt, at raðfylgjan gjørdist ein onnur.

At kappingin leygardagin hevði bæði føroyskt met og tøtt úrslit at bjóða, undrar ikki tey í bogaskjótifeløgunum, tí haðani frætta vit, at miðalskjótingin hjá teimum ungu hetta kappingarárið hevur verið væl hægri enn í langa tíð.



*Í bogaskjótikappingini um vikuskiftið betraði 13 ára gamla Annika Vang sítt egna met, sum hon setti í fjør, við 18 stigum*






# B68 gamlan stuðul og nýggjan venjara

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Toftamenn eru farnir at brynja seg út til komandi kappingarárið í fótbólti, og eingin ivi man vera um, at ætlanin er at røkka hægri enn tað sættaplássið, B68 fekk í ár.

Fíggjarligi stuðulin verður í øllum førum tann sami, sum hann hevur verið síðstu fýra árini, tí seinnapartin í morgin fara formaðurin í B68, Niclas Davidsen, og stjórin í Føroya Tele, Andras Róin, at skriva undir nýggjan stuðulssáttmála.

Samstundis verður sáttmáli eisini undirskrivaður við nýggja venjaran hjá toftamonnum, sum verður Petur Mohr. Hann er ikki nakað ókent navn í B68, har hann eisini var venjari í 1994 og 1995.

Hjálparvenjarar hjá Peturi verða Ingolf Petersen og Aksel Højgaard, og fara teir tríggir at taka sær av manslíðunum í 1. og 2. deild, umframt av unglingunum hjá B68.

Ingolf Petersen hevði saman við Kjartan Nesá ábyrgdina av 1. liðnum hjá B68 síðstu trý umfrini í landskappingini í ár, eftir at danski venjarin Frank Skytte varð uppsagdur.

Men sum skilst, hevur Kjartan ikki stundir at halda fram sum hjálparvenjari næsta ár, og tí er Aksel Højgaard komin í staðin.

At samstarva um venjing er ikki fremmant fyri Petur Mohr og Ingolf Petersen, tí teir báðir vóru ávikavist venjari og hjálparvenjari hjá NSÍ í fjør.





